# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BLIVIN KLÓKARI SÍÐANI 1992...

Tað er kanska ikki so lætt at av-lesa politisku signalini frá landsins hægstu monnum í sambandi við eina loysn av Eik Banka. Tó so, við teimum rundu orðunum hjá Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharra, og Kaj Leo Johannesen, løgmanni, tykist ikki, at teir halla til at vera so avgjørdir sum landsbankastjórin og onkur annar búskaparfrøðingur, sum vilja hava landið at halda seg langt burtur frá eini bankabjarging.

Men á tíðindafundi hjá Eik í gjár gjørdi nevndarformaðurin í Finansiel Stabilitet púra greitt, at Finansiel Stabilitet ikki undir nøkrum umstøðum fer at reka bankan víðari. Hann gjørdi greitt – eins og stjórin í Finasiel Stabilitet og Jørn Astrup Hansen, fyribilsstjóri í Eik Banka – at um ein skikkaður keypari ikki verður funnin fyri 10. desember, so verður bankin avviklaður. Og kemur tað hartil, so verður útlánsrentan í hesum avviklingartíðarskeiði tann hægsta, eins og innlánsrentan verður tann lægsta, allir kredittir til vinnulívið steðga og so framvegis.

Hetta er sera álvarsamt – og tað er beinleiðis bekymrandi, at so langt skal vera ímillum tað, sum nú kemur fram frá Finasiel Stabilitet og so tað sum landins fremstu fíggjarfrøðingar siga. Sambært Jóannes Eidesgaard í gjár, so er andstøðan í løgtinginum heldur ikki við í eini møguligari bjargingarætlan – sum eftir øllum at døma skal gerast gjøgnum Fíggingargrunnin frá 1992, sum kann útvega sær kapital við at selja partabrøvini í BankNordik.

Tað er væl skiljandi, at hetta málið elvir til høvuðbrýggj í politisku skipanini. At Jóannes Eidesgaard hugsar seg væl um – og vendir øllum møguleikum, er ein sjálvfylgja. Um íleggjararnir verða føroyskir ella útlendskir, tað hevur minni týdning, og best er sjálvandi, um tað almenna kann halda seg lang uttanfyri. Men tað tykist trupult.

Í gjárkvøldið sóu vit eisini dokumentarsendingina um Eik Banka hjá Kringvarpinum – har eisini trupulleikin við valdsbýtinum, har nevnd og stjórn var so samanblandað, at alt valdið lá hjá stjórnini. Frithleif



Olsen viðgekk nærmast, at nevndin var eins inkompetent sum leiðslan – og at um tey góvu leiðsluni fótin, so søgdu tey í veruleikanum seg sjálvan frá.

Hetta lýsir væl hvussu skríggjandi galið tað hevur verið við ábyrgdini. Ein slík skipan má ikki endurtakast – heldur ikki, um Tryggingarfelagið Føroyar verður høvuðspartaeigari.

Konspiratiónsteoriirnar kunnu vera nógvar. Eisini nú danski eigarin av Eik Banka spennir tummilfingrarskrúvurnar, men – sum Astrup eisini segði – vit eru øll blivin klókari síðani 1992, so vit endurtaka ikki somu mistøkini. Tað man vera galdandi bæði fyri føroyskar og danskar myndugleikar, ella hvussu?

**Nevndin var eins inkompetent sum leiðslan**

# Seyður og seyðahald í Norðurlandahúsinum



Komandi mánakvøld klokkan 19 verður kvøldseta í Norðurlandahúsinum um seyð og fjallgongu. Hetta er sama kvøldsetan, sum var í Mentanarhúsinum herfyri.

Hóast veðrið ikki var av tí besta, so var at kalla fullsett í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har Frits Johannesen hevði sett upp áhugaverda skrá við seyðapráti.

– Onkur tók til, at kvøldið var so upplýsandi og áhugavert, at tað átti at verið bandað. Tá var Frits kvikur at svara, vit fara bara í Norðurlandahúsið við hesum sama tiltaki, siga tey úr Fuglafirði.

Magna Thomassen, lærari, dóttir Petrinu og Robert Joensen, fer at siga frá um faðir sín, sum m. a. skrivaði um seyð og seyðahald í Norðoyggjum. Kristin Poulsen, lærari, fer at siga frá seyðasøgum og seyðarakstri í Fuglafirði. Jákup Pauli Johannesen, arkitektur, hevur hugarák í samband við at hava seyð og søgur frá faðir sínum, Evaldi Johannesen. Petur Martin Petersen, kunningarstjóri, ber fram eitt seyðakvæði, sum hann hevur yrkt. Dávur Winther, mentanarleiðari, fer at siga frá seyðarakstri á Skarvanesi og eisini fer Niels Midjord at syngja: Fimm feitar flugur, sum ikki eru so vælkomnar í sambandi við seyðahald.

Vístar verða myndir við uppvørpu á veggin frá fjallgongu í Klemmuni, Gjógvará, Fjalli, Skarðhaga, á Góðadali, Rustini og ein lítil filmur verður eisini vístur. Hesum stendur Kjartan Madsen, fotografur, fyri.

Frits Johannesen hevur lagt kvøldsetuna, sum verður í Athøllini í Norðurlandahúsinum, til rættis. Kostnaðurin fyri tiltakið er fimmti krónur.



**Hvørvandi parkeringspláss**

HEÐIN MORTENSEN
KJAK Á SÍÐU 36



**Privatiserið Rúsuna**

FÓLKAFLOKSUNGDÓMUR
KJAK Á SÍÐU 22

# Helena lívgar Kringvarpið

Gongur tað so, sum Helena Dam á Neystabø vil, so fer aftur at fløða í kassanum hjá Kringvaprinum. Tí landsstýriskvinnan í mentamálum fer nú at broyta kunngerðina um kringvarpsgjald. Í dag er tað Kringvarpið, sum skal prógva, um tú hevur sjónvarp ella útvarp og harvið ert tvungin at rinda kringvarpsgjald. Hetta verður nú vent við. Nú skulu øll hava uppkrav, og hevur tú hvørki útvarp ella sjónvarp, so er tað tín uppgáva at prógva tað fyri at sleppa undan at gjalda.

Men tað nýggja er eisini, at nú skulu øll, sum hava internetsamband eisini rinda kringvarpsgjald. Tað vil siga, at um tú frávelur útvarp og sjónvarp – so sleppur tú kortini ikki undan at gjalda fyri tað, um tú hevur internetsamband, og tað mást tú hava til so ómetaliga nógv onnur endamál enn at lurta eftir Kringvarpinum.

Soleiðis fær Kringvarpið eyka inntøkur. Og so kann Helena Dam á Neystabø liva upp til lyftið um, at lýsingarnar í Kringvarpinum skulu niðurlagast. Men tað er tíverri lítið, sum bendir á, at hon virðir hesa semju. Privatu miðlarnir hava ongan kjans at kappast við Kringvarpið, sum við eini 80 almennum milliónum undirbjóðar á lýsingarmarknaðinum. Soleiðis er tað landsstýriskvinnan í mentamálum, sum er ein hóttan ímóti tilverugrundarlagnum hjá privatu miðlunum í Føroyum. – *Tað er ómentað...*



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*